NÝTT NÝTT NÝTT




TEKNA TEG SUM HALDARA **NÚ.**
**450,-** UM ÁRSFJÓRÐINGIN
SPARIÐ **395,-** Í MUN TIL LEYSASØLU

600,- kr. um ársfjórðingin í Danmark
(500,- kr. fyri 1 ferð um vikuna - 5 bløð)

Sosialurin 341800

**Sosialurin**
ARGJAVEGUR 26 · P.O.BOX 76 · FO-110 TÓRSHAVN · TEL 34 18 00
FAX 34 18 01 · POST@SOSIALURIN.FO · WWW SOSIALURIN.FO

**Ókeypis**
Verður sent
ófrankerað
Sosialurin
rindar
postgjaldið

**64**

**Sosialurin**
Postsmoga 76
110 Tórshavn

Undirritaði teknar seg sum haldara av Sosialinum, og fær blaðið 5 ferðir um vikuna.

Navn:
Bústaður:
Postnr.:
Bygd/býur:
Telefon nr.:
Undirskrift:


**Landssjúkrahúsið**
FO 100 Tórshavn

# Sjúkrarøktar-frøðingar

Til **Skurðgongina** verður søkt eftir tveimum sjúkrarøktarfrøðingum:

- fast starv, á starvsbrøki 0,75, við royndum innan endoskopi og arbeiði innan operatiónsdeild til setan skjótast gjørligt. Viðkomandi kemur at taka sær av endoscopiini umframt arbeiði á einari operatiónsdeild.

  Móttiknir verða ambulantir og innlagdir sjúklingar til kanning og viðgerð. Vaktarskipanin verður røkt av sjúkrarøktarfrøðingunum í Skurðgongini.

  Fasta arbeiðstíðin liggur millum klokkan 8.00 og 16.00 vanligar yrkadagar.

- tíðaravmarkað starv, á starvsbrøki 1,0, við royndum innan operatiónsdeild til setan 1. februar 2005 til 31. desember 2005.

Introduktión og upplæring verður tilrættalagt.

**Førleikakrøv**
- prógv og góðkenning sum sjúkrarøktarfrøðingur
- royndir innan arbeiði á operatiónsdeild
- góð samstarvsevni og fleksibilitetur
- positivur hugburður og opinleiki
- áhugi fyri mennandi avbjóðingum

**Nærri fæst at vita** um størvini við at venda sær til Nainu Túgvustein, deildarleiðara tlf. 30 45 00 lokal 5200 til Ceciliu Vestureið, leiðandi sjúkrarøktarfrøðing, lokal 5102, e-postur ceci@lsh.fo

**Umsóknarfreistin** er 24. januar 2005 kl.12.00.

**Skrivlig umsókn** merkt "umsókn til starv" við CV, avrit av prógvum, autorisatión, viðmælum e.l. skulu sendast til

**Landssjúkrahúsið**
Lønar- og Starvsfólkadeildin
FO 100 Tórshavn

*Á heimasíðuni hjá Landssjúkrahúsinum www.lsh.fo sæst meira um størv við at klikka á leinkjuna "starvsfólk"*


Lesið
Sosialin
-so eru tit við!


**ALMANNA- OG HEILSUMÁLARÁÐIÐ**

## Endurlýsing

# Leiðari til nýggjan stovn fyri fjølbrekað børn

Almanna- og heilsumálaráðið hevur gjørt av, at ein nýggjur stovnur fyri fjølbrekað børn skal setast á stovn.

Í hesum sambandi verður søkt eftir leiðara til stovnin at byrja skjótast til ber.

**Um stovnin**
Stovnurin, sum verður á Saltnesi í Nes-Runavíkar kommunu, verður skipaður sum ein serstovnur fyri fjølbrekað børn. Stovnurin skal samskipa ansing, viðgerð og menning av fjølbrekaðum børnum soleiðis, at hetta virksemi verður á einum stað. Børnini hava eisini møguleika at koma til umlætting á stovninum um kvøldið og/ella um náttina.

Stovnurin verður tann fyrsti av sínum slag í Føroyum.

Stovnurin er normeraður til 8 fjølbrekað børn í aldrinum 0 til 18 ár.

**Uppgávur**
Tann fyrsta uppgávan hjá leiðaranum verður at byggja stovnin upp og at gera neyðugar fyrireikingar til at taka ímóti børnunum. Harumframt hevur leiðarin ábyrgdina av:
- at leiða og reka stovnin,
- at samskipa arbeiðið hjá starvsfólkunum á stovninum,
- at stimbra og menna børnini,
- saman við eini upptøkunevnd at avgera, hvørji børn fáa pláss á stovninum.

**Ábyrgd**
Leiðarin hevur fakligu, fyrisitingarligu og fíggjarligu ábyrgdina av stovninum mótvegis Almanna- og heilsumálaráðnum í eitt tíðarskeið. Síðan er ætlanin, at dagstovnurin umsitingarliga skal liggja undir Almannastovuni. Hetta verður væntandi um eitt ár.

**Førleikakrøv**
Søkt verður eftir einum persóni við útbúgving sum námsfrøðingur, fysioterapeutur ella ergoterapeutur.

Ynskiligt er, at persónurin hevur umsitingarligar og fakligar royndir og góð samstarvsevni.

**Lønar- og setanartreytir:**
Lønar- og setanartreytir eru sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og viðkomandi yrkisfelag.

**Umsóknarfreist:**
Umsókn saman við avrit av prógvum, viðmælum v.m. skal sendast til: **Almanna- og heilsumálaráðið Starvsfólkadeildin, Eirargarður 2, 100 Tórshavn**, ella til teldupost ahr@ahr.fo

Umsóknin skal verða Almanna- og heilsumálaráðnum í hendi innan 20. januar 2005, kl. 12.00.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Almanna- og heilsumálaráðið, Súsonnu Nolsøe á telefon 30 40 50 ella 30 40 36 (beinleiðis).